tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 17.07.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 56/25 | 25/00181-5 | Suðuroyar ferðavinnufelag |
| 57/25 | 25/00107-1 | Kirkjugarður - tørvs- og støðulýsing 2025 |
| 58/25 | 25/00214-7 | Loyvi og treytir til gróttøku í Froðba - avtala við MTV |
| 59/25 | 21/00496-19 | Tunnilsgrót frá Hvalbiar tunlinum – liðuggerð av økinum sambært avtalu við LV |
| 60/25 | 24/00095-3 | Kongavitjan 2024/2025 -onnur viðgerð av eykajáttan |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin og kunnar um at eitt mál eru komin aftur at skránni, eftir at henda bleiv kunngjørd alment. Talan er um mál *"60/25 onnur viðgerð av eykajáttan í samb. við Kongavitjan"*.

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna – ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**<u>56/25</u>**
**<u>25/00181-5 Suðuroyar ferðavinnufelag</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 18.06.2025 | 11/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 65/25 |
| 3 Býráðið | 17.07.2025 | 56/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.06.2025**
Fyrisp. er móttikin frá grannakommunum í Suðuroynni, hvørt áhugi er fyri at endurstovna Suðuroyar Ferðavinnufelag. - Tvøroyrar býráð hevur samtykt at Tvøroyrar kommuna fer úr Suðuroyar Ferðavinnufelag pr. 1. Jan. 2018.

Samb. skriv frá Magnus Paula West, Trivnaðarleiðari í Vágs Kommunu, dagf. 2. Juni 2025, verður fráboða vegna Suðuroyar Ferðavinnufelag:

*Góðu tit í Tvøroyrar kommunu,*

*Eg sendi hendan teldupostin vegna Suðuroyar Ferðavinnufelag. Limakommunurnar hava avgjørt, at virksemið í felagnum skal takast upp aftur, eftir at tað hevur ligið stilt í eina tíð. Hetta fegnast vit um, tí ferðavinnan á oynni hevur stórt potentiali og tørvar ein felagsskap sum Suðuroyar Ferðavinnufelag.*

*Vit meta, at tað er av stórum týdningi, at allar kommunurnar á Suðuroynni eru umboðaðar í felagnum og standa saman um at menna oynna sum ferðamál – eisini tit í Tvøroyrar kommunu.*

*Vit vita, at Tvøroyrar kommuna fyri nøkrum árum síðani tók seg úr felagnum. Við hesum vilja vit heita á kommununa um at viðgera limaskapin av nýggjum, við vón um, at tit aftur gerast limir í felagnum.*

*---*
*Kommunalu umboðini eru:*
*Jónfinn Lygvej Poulsen, Hvalbiar kommuna*
*Arni Teindal, Fámjins kommuna*
*Lina Hamrá Grækarisdóttir, Hovs kommuna*
*Ása Bech, Porkeris kommuna*
*Magnus Pauli West, Vágs kommuna*
*Halltóra Joensen, Sumbiar kommuna*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið vinnu- & havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 18. juni 2025:**
Nevndin hevur viðgjørt umsóknina, og mælir til, at formaðurin í Vinnu- og havnanevndini møtir á fyrstkomandi fundinum hjá Suðuroyar Ferðavinnufelag fyri at finna útav, hvat hetta málið snýr seg um, og hvat hetta merkir fíggjarliga fyri Tvøroyrar kommunu.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini.

**Kommunustjórin 14.07.2025:**
Starvsfólk á Kunningarstovuni á Tvøroyri -*John Jacobsen*- hevur hin 1. Juli 2025 verið á fundi hjá Suðuroyar Ferðavinnufelag. Á fundinum vóru umboð úr Fámjins-, Hvalbiar-, Vágs-, Tvøroyrar kommunu. Kommunalu umboðini *(Hvalbiar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur)* heita á kommunur, ið hava tikið undir við niðurlegging av felagnum, um at endurskoða ta støðuna og viðurkenna felagið sum eitt felags forum fyri ferðavinnumenning í Suðuroynni.

Víst verður til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu *(Ferðavinnulógin)*

> *§ 6. Allar kommunur skulu, saman við bóndum, heimafólki og øðrum viðkomandi pørtum, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar. Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark, men kommunur kunnu samstarva um at gera ferðavinnuætlanir fyri natúrligt avmarkað øki.*
>
> *Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvat ferðavinnuætlanin skal innihalda, eins og ásett kunnu verða krøv til ferðaleiðarar.*
>
> ***Stk. 3. Ferðavinnuætlanin, sum skal góðkennast av landsstýrisfólkinum, skal vera liðug í seinasta lagi 31. desember 2025.***

**Til viðgerðar og støðutakan hjá Tvøroyrar býráð:**
Skal Tvøroyrar kommuna aftur gerðast partur av Suðuroyar Ferðavinnufelag, sum arbeiðir fram ímóti eini felags ferðavinnuætlan fyri Suðuroynna?

Umsitingin mælir býráðnum til at meta um hvør, viðtøkurnar fyri Suðuroyar Ferðavinnufelag, samsvara við tørv og ynskir hjá Tvøroyrar kommunu. -*viðtøkur eru viðlagdar.*

**Viðtøkur fyri Suðuroyar Ferðavinnufelag:**

***§ 4. Nevnd***
*Stk. 1. Kommunurnar velja hvør sítt umboð og varaumboð i nevndina eftir hvørt kommunuval. Nýggja nevndin tekur við á fyrst komandi aðalfundi eftir kommunuval.*

***§ 5. Aðalfundur***

*Stk. 4. Á Aðalfundinum møta borgarstjórarnir, ella varaumboð teirra, hjá einstøku lima kommununum, hvør við sínari atkvøðu. Aðrir kommunustýrislimir enn borgarstjórin hava eisini rætt at møta og taka orðið, men hesir hava kortini ikki atkvøðurætt. Aðalfundurin er altíð viðtøkuførur.*

**Býráðið 17. juli 2025:**

Borgarstjórin mælir til at heita á Suðuroyar Ferðavinnufelag, um at endurskoða og broyta viðtøkurnar fyri Suðuroyar Ferðavinnufelag, soleiðis at ásett verður, at limakommunurnar eru limir í felagnum við somu skyldum og rættindum í mun til íbúgvaratalið í kommununim, og at taka málið upp aftur til nýggja viðgerð eftirfylgjandi. -Einmælt samtykt

**57/25**
**25/00107-1 Kirkjugarður - tørvs- og støðulýsing 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 6/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 31/25 |
| 3 Býráðið | 31.03.2025 | 24/25 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.05.2025 | 12/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 48/25 |
| 6 Býráðið | 02.06.2025 | 33/25 |
| 7 Tekniska nevnd | 11.07.2025 | 22/25 |
| 8 Býráðið | 17.07.2025 | 57/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.03.2025**
Borgarstjórin heitur í telduposti á umsitingina um at reisa málið aftur í teknisku nevnd, við tilmælið um at ógilda býráðssamtyktina frá 30 september 2020 um ikki at víðkað kirkjugarðin undir Akugerði longur eystur.

*Málið var seinast til viðgerðar í Teknisku nevnd hin 4. desember 2024, har tekniska nevnd mælti til, at borgarstjórin fer í eitt samskifti við nærmastu grannarnar hjá kirkjugarðinum fyri at finna eina loysn uppá at víðka verandi kirkjugarð sum skjótast. Eisini mælti tekniska nevnd til, at arbeitt verður víðari við einari loysn uppá aðra staðseting av nýggjum kirkjugarði*

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2025, §619 avsett kr. 5,0 mió.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 10. marts 2025:**
Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum. Arbeiðið við at víðka kirkjugarðin longur eystur skal setast í gongd so skjótt sum til ber. Nevndin heitir á teknisku deild at fáa garðin oman ímóti bakkanum víðkaðan eystureftir, og at planta trø ímóti húsunum eystanfyri kirkjugarðin í samráð við nærmastu grannarnar.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá borgarstjóranum og Teknisku nevnd, at víðkað kirkjugarðin á matr.nr 30 longur eystur heilt at matr.nr. 20, 22, 24, 26, 28 so skjótt sum til ber. Málið verður beint í býráðið, við tilmælið um at ógilda býráðssamtyktina frá 30 september 2020.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini at víðkað kirkjugarðin á matr.nr 30 longur eystur heilt at matr.nr. 20, 22, 24, 26, 28. Heitt verður á umsitingina at byrja at projektera hesa ætlanina við hægstu raðfesting.
**Viðm. Tekniski leiðarin (GM) tann 09.05.2025**
Ástaðarfundur var í kirkjugarðinum undir Akurgerði tann 07.05, har m.o. kommunan og verkfrøðingur vóru umboðaði. Víst varð á bráðfeingis tørvin á gravarplássum, har gravarin gjørdi vart við, at tað nú bert eru 9 dupultgravir eftir í kirkjugarðinum.
Avgjørt varð, at arbeiðið við at víðka kirkjugarðin ikki kann bíða, og tí má kommunan fara í gongd beinanvegin fyri at loysa tann akutta tørvin, ið er á plássum í løtuni og í øllum førum nøkur ár fram.
Ráðgevandi verkfrøðingurin kom við uppskoti um, at kommunan arbeiðir víðari við ætlanini um at staðseta ein nýggjan kirkjugarð á matr.nr. 25c, 25d og 26b.

**Tekniska nevnd 12. maj 2025:**
Nevndin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini, ið fyriliggur. Málið verður beint víðari í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd, og heimila umsitingini at arbeiða víðari við fyriliggjandi ætlan, um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at heimila umsitingini at arbeiða víðari við fyriliggjandi ætlan, um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13. - Einmælt samtykt.

**Tilmæli fra borgarstjóranum 10-07-2025:**
Borgarstjórin mælir til at broyta samtyktina um at víðka kirkjugarðin eystureftir, og í staðin at flyta atkomuvegin, soleiðis at hann fer eystureftir (sí mynd). Har sum núverandi atkomuvegur er, verður pláss til uml. 120 gravir, og tað kann nøkta tørvin í 4-5 ár.



**Tekniska nevnd 11. juli 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá borgarstjóranum.
Málið verður beint í býráðið.

**Kommunustjórin 14.07.2025**
Viðmerking
*Í málsviðgerðini omanfyri eru nevnd matr.nr. 20, 22, 24, 26 og 28. Hetta er ikki rætt. Røtt matrikulnummur eru 34a, 34b, 34c, 34d og 34e, sum svara til adressurnar á Froðbiarvegi 20, 22, 24, 26 og 28.*

Til støðutakan er nýtt tilmælið frá Teknisku nevnd, dagfest 11. juli 2025, um at flyta atkomuvegin eystureftir og harvið skapa pláss fyri uml. 120 nýggjum gravum, sambært viðfestum kortskjali.

Hetta nýggja tilmælið frá Teknisku nevnd hevur við sær, at býráðið má taka støðu til at ógilda samtyktina frá býráðsfundinum tann 31. mars 2025.

**Býráðið 17. juli 2025:**
Form. í teknisku nevnd greiði frá ætlanini, um at um at flyta atkomuvegin eystureftir heilt at markinum móti matr.nr 34a  og harvið skapa pláss fyri uml. 120 nýggjum gravum, sambært viðfestum kortskjali.
Einmælt samtykt

Atkvøtt verður um at ógilda samtyktina frá býráðsfundinum tann 31. mars 2025.
Fyri: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer
Ímóti: ongin
Blankt: Arnfinn Bech, Eyð Eidesgaard
**Málið er samtykt. (fyri/ímóti/blankt: 5/0/2)**

58/25
## 25/00214-7 Loyvi og treytir til gróttøku í Froðba - avtala við MTV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.07.2025 | 23/25 |
| 2 Býráðið | 17.07.2025 | 58/25 |

**Málslýsing:**
Leisturin fyri gróttøkuna í Froðba er broyttur soleiðis, at tað verður byggivirkið MTV sum stendur fyri gróttøkuna, um virkið fær loyvi frá kommununi.
Tvøroyrar kommuna og MTV ger avtalu um gróttøku.

**MTV skrivar 4. Juli 2015:**
Í sambandi við útfyllingina av nýggja kaiøkinum, hava vit umframt grótið frá Hvalbiartunnlinum, brúk fyri uml. 60.000 m3 eyka av gróti (innbygt nøgd).
Vit vilja við hesum skrivi spyrja, um loyvi at spreingja manglandi gróti úr grótbrotinum í Akurgerði.
Prísur og treytir annars fyri grótið eftir nærri avtalu.
Vit hava dronuuppmating av øllum lendinum við Akurgerði. Tá moldin er grivin omanav, kann hellan mátast inn áðrenn og aftaná tað er sprongt. Uppmátingin kann brúkast til eftirkanning av grótnøgdunum

**Lógargrundarlag:**
Kommunufultrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan fær eitt endurgjald uppá 2,3 mill. Kr.
Herumframt verður framleitt uml. 31.000 m3 grótt sum verður ogn hjá kommununi
Økið verður latið aftur sambært avtalu

**Tilmælið:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til avtalu við MTV Byggivirki.

**Tekniska nevnd 11. juli 2025:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til avtalu við MTV Byggivirki um gróttøku.

**Býráðið 17. juli 2025:**
Form. í teknisku nevnd greiði frá ætlanini, og avtaluni um gróttøku.
Atkvøtt verður um tilmælið hjá teknisku nevnd um gróttøku samsv. avtalu við MTV byggivirkið.
Fyri: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Eidesgaard.
Ímóti: Arnfinn Bech
Blankt: ongin
**Málið er samtykt. (fyri/ímóti/blankt: 6/1/0)**

Arnfinn Bech mælir til at í §2 í avtaluni um gróttøku verður ásett ein dagfesting nær arbeiði skal verða liðugt, og at nærri greini verður hvussu økið skal latast aftur. Og at endurgjaldið kundi verði hægri.

**59/25**
**21/00496-19 Tunnilsgrót frá Hvalbiartunlinum - liðuggerð av økinum sambært avtalu við LV**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.07.2025 | 24/25 |
| 2 Býráðið | 17.07.2025 | 59/25 |

**Málslýsing:**
Sambært avtaluni við Landsverk áliggur tað Tvøroyrar kommunu at endurskapa lendið, har grótið hevur ligið. Landsverk deponerar kr. 400.000, sum verða goldnar Tvøroyrar kommunu, tá ið arbeiðið at endurskapa lendið er góðkent av Landsverki. Arbeiðið skal verða liðugt fýra mánaðar eftir, at tunnilsgrótið er heintað.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Eftir ætlanini útreiðslu-neutralt

**Tilmælið:**
Mælt verður til at innheinta tilboð frá lokalum veitarum.

**Tekniska nevnd 11. juli 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum um at innheinta tilboð frá lokalum veitarum.

**Býráðið 17. juli 2025:**
Form. í teknisku nevnd greiði frá ætlanini um at innheinta tilboð frá lokalum veitarum at endurskapa økið samsv. avtalu millum Tvøroyrar kommunu og Landsverk. Einmælt samtykt.

**60/25**
**24/00095-3 Kongavitjan 2024/2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 3/25 |
| 5 Býráðið | 31.03.2025 | 19/25 |
| 6 Býráðið | 17.07.2025 | 60/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.05.2024**
Tvøroyrar kommuna fær vitjan av Kong Frederik og Dronning Mary 13. juni 2024, og verður Tvøroyrar Kommuna í hesum sambandi vertur fyri hátíðarveitslu í SALT á Drelnes kl. 19.00.

Skráin fyri vitjanina er, at Kongshjúnini vitjar í barnagarðinum Mýrifípuni, haðani fari verður vestur í plantaguna, har tey planta eitt træ í samband við at plantagan fyllir 100 ár í 2024.

Kongaskipið Dannebrog liggur við bryggju á Drelnes, haðani tað fer frá bryggju við kongsparinum kl. 22.00.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mælt verður til at fíggja vitjanini sum eykajáttan til §114, umboðan**.**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað -Fíggjarnevndin mælir til at vitjanin verður fíggja við **eykajáttan §115 íløgur** í fyrisiting. Málið verður beint í býráðið eftir at greitt er, nær Kongavitjanin verður.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinum fundi.

**Kommunustjórin 21.juni 2024:**
Sum øllum kunnugt, bleiv Kongavitjanin, ið skuldi verða 11.-12. Juni 2024 fyribils avlýst. Avgerðin at avlýsa bleiv tikin av Løgmanni, orsakað av óvissu um verkfallið hjá FA kundi ávirka Kongavitjanina. Nú er uppskot, ið tó enn ikki er alment fyri vitjanina, fyrr enn grønt ljós er komið frá kongshúsinum at vitjanin verður frá 11.-13. juni 2025. Tað merkir, at vitjað verður í Havn mikudagin 11. juni, í Vági, Fámjin og á Tvøroyri hósdagin tann 12. juni

**Býráðið 27. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 14. Januar 2025:**
Løgmálaráðið og Kongshúsið boða alment frá, at vitjanin hjá Fríðriki kongi og Mary drotning í Føroyum verður frá 11.-13. juni 2025. Tað merkir, at vitjað verður í Havn mikudagin 11. juni, í Vági, Fámjin og á Tvøroyri hósdagin tann 12. Juni.

Kommunustjórin mælir til, at byrja fyrireikingina av vitjanini í viðvíkur Tvøroyrar kommunu.

**Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:**
Málið er umrøtt, kunnað og tikið til eftirtektar.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Borgarstjórin kunnar um kongavitjanina, málið bleiv umrøtt og tikið til eftirtektar.

**Kommunustjórin 17.07.2025:**
Onnur viðgerð av eykajáttan

**Býráðið 17. juli 2025:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð at fíggja Kongavitjanina við eykajáttan av FÆ2025 §115, íløgur í umsitingini.

Fundurin lokin kl. 17:55

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech